# FCK Tapti

**Fyri fyrstu ferð í ár noyddist høvuðsstaðarfelagið av vøllinum sum tapti, men munurin fram til oddin minkaði tó einki**

SUPERLIGAN
*Jákup Mørk*

Eftir at 2001 í hálvan áttanda mánað hevur verið ein sigursgongd hjá FCK, mátti liðið sunnudagin fara av vøllinum sum tapari. Hetta hendi sera óvæntað í dystinum móti Esbjerg, men úrslitið var tó kanska ikki heilt so óvæntað, sum fleiri vilja gera tað til.

FCK skuldi nú brádliga umstilla seg til at spæla í meira eyðmjúkum umhvørvi enn einari fullsettari Parken, eins og mótstøðuliðið eisini var meira eyðmýkt enn fótbóltsmillióningarnir úr Lazio, sum FCK hitti herfyri.

Esbjerg kom á odda tíðliga í dystinum, og hóast teir um miðjan fyrra hálvleik fingu ein mann riknan av vølli, eydnaðist teimum at halda fast um dystin, eftir at teir beint fyri hálvleik øktu við brotssparki. Thomas Thorningar minkaði um munin í seinna hálvleiki, man tað var ov seint hjá FCK.

Umframt Toda Jónsson máttu hvítu leyvurnar annars vera bæði Christian Poulsen og Sibusiso Zuma fyri uttan til dystin. Poulsen fekk ein lítlan løst í dystinum móti Lazio, meðan Zuma hevur fingið frí í nakrar dagar, eftir at hjava spælt fótbólt út í eitt í meira enn eitt ár.

### Munurin hin sami

Alt hetta kann FCK neyvan nýta sum nakra umbering, men hinvegin mundi tað koma væl við, at fyrrverandi felagið hjá Toda, Lyngby, megnaði at koppa Brøndby. Sostatt er munurin upp til oddin framhaldandi hin sami, tó at tað nú eru heldur fleiri um boðið til oddasessin.

**Úrslitini hetta vikuskiftið vóru annars:**

| | |
|---|---|
| AB-Viborg | 1-2 |
| AGF-FCM | 0-1 |
| Lyngby-Brøndby | 1-0 |
| Vejle-Silkeborg | 3-0 |
| OB-AaB | 0-2 |
| Esbjerg-FCK | 2-1 |



*Fyri fyrstu ferð í ár noyddust teir í FCK av vøllinum sum taparar, tá teir sunnudagin vitjaðu í Esbjerg*

# Molde tapti á botnliðið



**Bryne hevði ikki vunnið síðani í mei mánaði, men teir megnaðu kortini at basa Molde**

TIPPELIGAN
*Jákup Mørk*

Tað tóktist vera ein yvirkomulig uppgáva hjá Molde, tá teir sunndagin vitjaðu Bryne, sum er á niðasta sessinum í bestu norsku deildini. Heimaliði hevði ikki vunnið síðani 20. mei, og síðani tann sigurin hevur liðið bert megnað at skotið fýra mál.

Byrjanin gekk eisini eftir bókini, tí longu eftir sjey minuttum var støðan 2-0 til Molde, men so gekk alt brádliga galið.Á hálva tímanum minkaði Bryne um munin, og stutt fyri hálvleik førdi verjumistak hjá Molde við sær, at støðan brádliga var jøvn. Molde megnaði tó at leggja seg á odda aftur undan steðginum, men í seinna hálvleiki fór Bryne aftur at gera um seg.

Teir fingu tvey mál við deyðbóltsstøður, og í báðum førum var talan um beinleiðis fríspark, og í norsku miðlunum valdar semja um, at Jákup Mikkelsen helst skuldi fingið fatur á í øllum førum øðrum av hesum.

Avrikið hjá Jákupi verður tó mett sum miðal-gott. Saman við flestu av liðfeløgunum fær hann eitt fimm-tal á einum skala, sum gongur upp í 10.

Molde er í løtuni á sjeynda plássinum í deildini, og nógv stig skulu vinnast aftur, um liðið skal spæla seg fram til europeiska luttøku kom-

*Semja tykist vera í norsku miðlunum um, at Jákup skuldi havt í øllum førum*

# Lazio-FCK í sjónvarpinum

**Hjá hyggjarum við parabol er nú møguleiki at síggja seinna dystin millum Lazio og FCK**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað mundu vera nógvir føroyingar, sum mikudagin í farnu viku sótu við skíggjan, tá FCK í minniligum dysti basti italska Lazio við 2-1.

Hetta hevur sjálvandi viðført, at áhugin fyri at síggja seinna dystin millum liðini bæði er vaksin munandi. Fleiri rásir hava kappast um rættindini til dystin, men nú er so greitt, at tað verður TVDanmark, sum fer at senda beinleiðis frá dystinum.

Hesa rásina eru tað hampuliga nógv í Føroyum, sum síggja, so ivaleyst verður tað í nógvum stovum kring landið, at fólk fara at savnast, eins og dysturin helst eisini fer at verða vístur á stórskíggjum.

# Javnleikur í øllum førum

**Óli Johannesen skoraði, men Hvidovre máttu taka til takkar við javnleiki móti uppflytarunum úr Skive. Øssur Hansen og B93 spældu javnt móti Horsens**

DANMARK
*Jákup Mørk*

Umframt føroysku umboðanina í Superliguni, so hava føroyingar nú eisini fleiri leikarar í næst bestu donsku deildini.

Óli Johannesen og Hvidovre hava ætlanir um at gera seg galdandi í oddinum hetta kappingarárið, men byrjanin hevur ikki verið nøkur serlig hjá teimum.



*Óli Johannesen legði Hvidovre á odda móti Skive, men Hvidovre mátti kortini taka til takkar við javnleki*

Eftir at hava tapt fyri Øssi Hansen og B93 fyri viku síðani, leikti Hvidovre sunnudagin móti uppflytarunum úr Skive, og heldur ikki her eydnaðist Hvidovre at fáa fulla úrtøku.

Óli Johannesen legði annars Hvidovre á odda í fyrra hálvleiki, men Skive svaraði aftur, og tað var ikki fyrr enn stutt undan leikloki, at tað eydnaðist Hvidovre at tryggja sær javnleikin.

Øssur Hansen og B93 høvdu torføra uppgávu, tá teir á heimavølli royndu seg móti AC Horsens. Javnleikur má tí metast sum eitt hampuliga gott úrslit, men ivaleyst munnu teir í árstalsfelagnum iðra seg um, at tað ikki eydnaðist teimum at halda fast um leiðsluna, teir vunnu sær í fyrra hálvleiki. Horsens javnaði leiðsluna undan steðginum.

Seinasti føroyingurin í deildini er Atli Gregersen, sum spælir við Randers Freja. Teir spældu á heimavølli málleysan javnleik móti FC Aarhus, og eiga eins og Hvidovre fyrsta sigurin til góðar.



FS Vágar-B71 2-1 (1-0):

# Dómadagur í Vágum

*Tað sær ógvuliga svart út hjá sandoyingum nú. Teir taptu týdningarmikla dystin móti FSV, og dystarskráin boðar frá seks sera torførum dystum, tað sum eftir er av kappingarárinum*



**Sjálvt veðrið spældi við, tá Vágamenn og Sandoyingar spældu helst týdningarmesta dystin á árinum fyri teirra viðkomandi. Úrslitið gjørdist ein heimasigur, og nógv bendir nú á, at sandoyingar noyðast niður í aðru deild komandi kappingarár**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Lagnudystur mundi vera nærmasta orða, tá FS Vágar og B71 fóru á vøllin í Miðvági leygaradgin. Hvørgin parturin hevur havt nakran serliga blíðan byrð hetta kappingarárið, og fyri líka sum at undirstrika hetta, høvdu veðurgudarnir gjørt av at spæla við í spælinum hendan dagin.

Ófantaliga veðrið við nógvum vindi og oysandi regni boðaði longu undan dystinum frá, at tað so avgjørt ikki vórðu fótbóltsligur dygdirnar, sum skuldi setast í hásætið, um talan skuldi gerast um trý stig hendan dagin. Heldur tóktist tað vera soleiðis, at viljin at vinna - bæði á mótstøðuni og regninum - fór at gerast avgerandi faktorurin.

### Skelkaðir sandoyingar

Sum kunngt var talan um dyst millum tey bæði niðastu liðini í deildini. Sandoyingar høvdu undan dystinum eitt stig meira, og tí vóru tað teir, sum best kundu liva við einum javnleiki, tó at trý stig sjálvandi vóru ynskjandi.

Vágamenn hinvegin vóru greiðir um, at ein javnleikur ikki kundi nýtast nógv annað enn at halda stantum, og við vissuni um hetta løgdu teir í krovið á gestunum, beint sum dysturin byrjaði.

Sandoyingar tóktust ikki sørt skelkaðir av ógvusligu byrjanini hjá vertunum, og fyrstu løtuna skolaðu álopini oman móti Waldemar Nowicki í málinum. Hann hevur í nógv ár verið mettur sum ein hin besti málverjin í landinum, og tað var eisini skjótt, at hann varð noyddur at vísa síni kynstur. Fleiri góðar bjargingar vóru at síggja, men tá heimaliðið so legði seg á odda, var pólverski málverjin fullkomuliga prísgivin.

Úr vinstru sendu teir á heimaliðnum ein høgan bólt inn fyri málið. Bólturin hevði sum so kós móti handaru stong, og at síggja til var eingin vandi á ferð. Waldemar stóð einsamallur í málteiginum, og hevði longu flutt seg yvir til stongina, tá Jógvan Jón Petersen royndi at skalla bóltin útfrá. Úrslitið av misskiljingini gjørdist, at Jógvan Jón í einum bleytum boga stútaði bóltin at kalla mitt í málið, og smílini á vágamonnum vóru sjónligt, tá teir kundu staðfesta, at gestirnir soleiðis høvdu hjálpt teimum at basa Waldemar.

### Kundu økt

Hóast teir nú vóru aftanfyri, so tóktist málið á ongan hátt at hava vakt gestirnar. Teir vóru framvegis alt ov dólskir í nærdystunum úti á vøllinum. Skipað samanspæl var millum lítið og einki, og tað var tí sera rár hending, at teir yvir høvur hóttu málið hjá Arturast Ramoskas.

Vágamenn hinvegin tóktust bara at ressast enn meira eftir málið. Hóast líkindini so avgjørt ikki vóru av teimum bestu, so royndu teir í løtum at spæla seg oman gjøgnum síðurnar, og meira enn ta einu ferðina var eisini um reppið, at enn eitt mál spurdist burturúr. Bernhard Petersen mátti ta einu ferðina bjarga inni á strikuni, og í einum tveimum øðrum førum var tað at kalla ótrúligt, at Waldemar onkursvegna fekk blokerað fyri atsóknunum.

### Hamskift í seinna

Kári Reynheim hevði helst havt teir heilt stóru bókstavarnir frammi í hálvleikinum, tí B71 var ikki at kenna aftur, tá teir komu út aftur til seinna umfarið.

Vágamenn royndu framhaldandi at halda fast um sítt spæl, men nú vunnu gestirnir minst líka nógvar nærdystir, og tá vindurin so eisini streyk oman móti vágamálinum, fingu sandoyingarnir sett eitt hampuligt trýst oman móti málinum.

Fyrstu løtuna var eisini líkt til, at okkurt munagott skuldi spyrjast burturúr, men antin vóru gestirnir ov óneyvir í avgerandi løtunum, ella kom ein vágafótur ella -høvd fyri, beint áðrenn seinasta skotið skuldi latast av.

Sandoyingar royndu at økja um trýstið. Verjan og miðvøllurin í felag trýstu alt longur niðan, og so hendi tað, sum so ofta hendir í slíkum støðum. Ein heldur tilvildarligur bóltur endaði hjá Birgiri Joensen. Stórur og sterkur, sum hann er, vann hann fyrst nærdyst við verjuleikara hjá sandoyingum, og við einum dómadagsskoti sendi hann av brotsteigarmarkinum bóltin í meskarnar.

### Høvdu ikki neyvleikan

Nú stóð nógv á hjá sandoyingum. Teir vistu, at tilveran í bestu deildini møguliga stóð og fall við útfallið av júst hesum dystinum, og meðan vágamenn løgdust at lúra eftir kontramøguleikum, søktu sandoyingar alt meira oman móti málinum.

Fleiri ferðir var um reppið, at hol fekst á, og eitt korter fyri leiklok brast fyri nev. Kári Reynheim skeyt í fyrstu atløgu frísparksroynd í múrin, men eingin tóktist varnast Bjørn Thorsteinsson, sum stóð púra leysur, og við einum góðum diagonalskoti gav hann sandoyingum eina lítla vón.

Dramatikkurin var soleiðis avgjørt til staðar seinasta korterið. Sandoyingar høvdu fleiri heilt góðar møguleikar, og einar tvær ferðir máttu teir á heimaliðnum prísa seg lukkuliga, men hinvegin kundu vágamenn eisini avgjørt eisini avgjørt alt, tá Sonni Johansen onkursvegna sveiggjaði beinið upp um bóltin í fríari skotstøðu.

Hvussu var og ikki, so endaði dysturin við heimasigri, og fyri fyrstu ferð í ár máttu sandoyingar soleiðis niður á botnsessin.

### Sær svart út

At sandoyingar eru at finna á niðasta sessinum, er í sjálvum sær kanska ikki nøkur katastrofa. Tað hava teir roynt áður, og teir hava eisini áður lívbjargað sær. Støðan hesa ferð tykist tó at vera eitt sindur meira álvarslig. Liðið hevur heilt greitt torførastu skránna av niðaru staddu liðunum, og tí kann væl vera, at tapið leygardagin í veruleikanum var mønustingurin hjá B71. Eisini hóast seks umfør enn eru eftir at spæla.

Vágamenn hava at kalla alt árið verið mettir sum fremstu dumpikandidatarnir, men við sigrinum hesa ferð flutta teir so ivasama heiðurin suður á Sand. Uppskriftin var meira enn nakað annað viljin til at bjarga sær. Ein vilji, sum hevur verið sjónskur, síðani nýggja venjaraparið tók við í vár, og teir báðir eiga tí uttan iva stóran heiður av avrikunum hjá vágamonnunum.

Venjararnir sjálvir gera tað tó ikki einsamallir. Síðani FSV náddi absolutta botnin við 0-15 tapinum í Havn, hevur gingið støðugt – um enn spakuliga – fram á hjá liðnum, og tað tænir eisini leikarunum til rós, at teir ongan tíð eru falnir í fátt, hóast uppgávan hevur sæð møtumikil út. Áhaldandi hava teir roynt at stríðst fyri felags málinum, og hetta sær nú loksins út til at hava givið úrslit.

### Dysturin í tølum:

**FS Vágar-B71 2-1 (1-0)**

1-0: sjálvmál, 21.
2-0:Birgir Joensen, 66.
2-1:Bjørn Thorsteinsson, 79.

**Dómari:** Lassin Isaksen (KÍ)

**FS Vágar:** Arturas Ramoskas – Vladlens Osipovs, Jógvan Hendrik Samuelsen, Poul H. Thomsen – Kim Pooulsen, Hannus Olsen, Jón Nielsen, Birgir Joensen, Jack Johansen – Jákup Joensen, Sonny Johansen

**B71:** Waldemar Nowicki – Bjørn Thorsteinsson, Bernhard Petersen, Jógvan Jón Petersen – Svenning W. Hansen, Peter Ritter, Jón Brekku, Símun Hansen, Hans Jørgen Djurhuus – Eli Hentze, Kári Reynheim